# Dagrøktin á skeið

*Læraraskúlin hevur snikkað saman skeið, sum stendur kommunum í boði at bjóða dagrøktarmammum. Í Tórshavnar Kommunu hava 24 dagrøktarmammur verið á skeið. Nýtt skeið verður í januar*

Dagfinn Olsen

Leygardagin vóru tær fyrstu av 24 dagrøktarmammum í Tórshavnar Kommunu lidnar á skeiði. Nú leygardagin verða hinar lidnar og verður í hesum sambandi samkoma á Føroya Læraraskúla leygardagin.

Tað er Føroya Læraraskúli, sum hevur snikkað saman eitt skeið fyri dagrøktarmammur.

Heri Kragesteen, sálarfrøðingur og lærari á Læraraskúlanum sigur, at leingi hevur verið hugsað um hetta, um tørv og hvussu hetta kann gerast.

– Talan er um nærumhvørvið og nakað, sum fer fram í egnum heimi, men harvið er ikki sagt, at tað ikki kann verða betri, sigur Heri Kragesteen.

**Aftur í januar**

– Talan er um eina ávísa professionellisering. Innihaldið á skeiðnum hevur verið børn og teirra menning, pedagogikkin og sálarfrøðin hevur havt stóran leiklut og eisini lógir og rættindi, sigur Heri Kragesteen.

Skeiðið tekur 3 vikur, harav 2 vikur eru á skúlabonki og ein vika er eygleiðing í egnum heimi.

Tá tær fyrstu 24 dagrøktarmammurnar í Tórshavnar Kommunu hava lokið skeiðið, so er ætlanin, at allar dagrøktarmammurnar í kommununi skulu hava møguleikan. Nýtt skeið byrjar aftur í januar komandi ár.

Fyribils eru tað bert dagrøktarmammur í høvuðsstaðnum, sum hava verið á skeið.

Spurdur, um ætlanir eru at fara út um miðstaðarøkið, sigur Heri Kragesteen, at hetta stendur til tær ymsu kommunurnar at taka støðu til.

– Føroya Læraraskúli hevur lagt skeiðini tilrættis. Hetta er eitt tilboð, sum so kann keypast. Sostatt stendur tað til kommunurnar sjálvar, um tær taka av, sigur Heri Kragesteen.






# Nýggja barnagarðslógin er góð

*Hetta heldur forkvinnan í Føroya Pedagogfelag, Carita Bjørklund. Hon heldur, at upprunauppskotið var sera tunt, men at Trivnaðarnevndin hevur gjørt stórt arbeiði og at landsstýriskvinnan eigur tøkk fyri, at lógin kom, áðrenn økið verður lagt út til kommunurnar at umsita. Hon heldur tó vera óheppið, at dagrøkt og dagstovnar eru undir somu lóg*

Dagfinn Olsen

Nýggja barnagarðslógin er kunngjørd og hon kemur í gildi 1. juli 2000.

Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag, Carita Bjørklund, fegnast um lógina.

– Lógaruppskotið var heldur tunt at byrja við, men eftir at tað hevur verið í trivnaðarnevndini, sum nógv fólk eisini hava vent sær til, er endaliga uppskotið ikki so galið, heldur Carita Bjørklund.

Hon vísir á, at í upprunauppskotinum var endamálsorðingin bert einar tvær reglur. Hinvegin er í dag talan um góða endamálsorðing.

Í upprunauppskotinum stóð eisini bert viðvíkjandi starvsfólkum, at leiðarin skuldi hava námsfrøðisliga útbúgving.

– Nú er bøtt um hetta og starvsfólkabýtið er ásett. Eisini er ásett, at vegleiðing og ráðgeving skal vera og alt hetta er sera gott, so eingin verður sleptur á fjall, tá økið verður lagt út til kommunurnar at umsita, sigur Carita Bjørklund, sum eisini fegnast um, at foreldraráðið veruliga er komið við í myndina.

**Danir hugtiknir**

– Skal ein vísa á nakað, sum er óheppið, so er tað, at dagrøktin og dagstovnar eru komnir undir eina og somu lóg. Hetta er keðiligt, tí hetta er ikki sambæriligt, heldur Carita Bjørklund.

Tó heldur hon, at rós skal gevast, har tað er uppiborið.

– Tað er gott, at Helena Dam á Neystabø hevur borið so í bandi, at lógin kom, áðrenn barnagarðsøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita og Trivnaðarnevndin hevur eisini gjørt gott arbeiði, sigur Carita Bjørklund.

Fyri stuttum var Carita Bjørklund í Danmark og hon vísir á, at danskir pedagogar eru ikki sørt hugtiknir av, at vit hava fingið hesa lóg, tí í Danmark hava tey leingi strongt á fyri at fáa eina slíka, men enn er hon ikki komin har.

# Sparikassin fluttur

Føroya Sparikassi hevur nú tikið í nýtslu nýggja bygningin Yviri við Strond 2. Í nýggju høvuðsskrivstovuni húsast nú stjórnin, øll umsitingin, vinnulívsdeildin, fíggjar- og uttanlandsdeildin.

Samskiftið við privatkundar Sparikassans í Havn fer framvegis fram á deildum Sparikassans í Sverrisgøtu, við Tinghúsvegin og í Hornabø.

Avgreiðslan av vinnulívskundum í HGavn er flutt úr Sverrisgøtu í høvuðsskrivstovuna Yviri við Strond, har Vinnulívsdeildin nú húsast. Her halda eisini uttanlandsdeildin og fíggjardeildin ti, soleiðis at avgreiðsla ráðvgeving til vinnulívskundar í høvuðsstaðnum er savnað undir sama taki.

Umsitingardeldirnar sum halda til í høvuðsskrivstovuni Yviri við Strond 2 eru:

- Stjórnarskrivstova
- Kredittdeild
- Fyrisitingardeild
- Marknaðardeild
- Starvsfólkadeild
- Roknskapardeild
- Edv-deild
- Innanhýusis grannskoðanardeild

Í sambandi við flytingina hevur Føroya Sparikassi fingið nýtt høvuðstelefonnummar. Nýggja nummarið er 348000

Almenn móttøka verður hósdagin 24. august 2000



# Yngd

Nr. 21 2000 SOSIALURIN

## Yngd hesuferð





Síða 15 Pílagrímsferð til Hollands

Síða 16-17 Flúgv, sigl, koyr - ella droym

Síða 18 Stubbar

Síða 19 Hitlistar og Svara So!

Baksíðan Fløguumæli